# Kvinnulandsliðið er nú úttikið

Landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, hevur nú gjørt av, hvussu hópurin til Algerve-Cup sær út. Kappingin, sum verður spæld í Algarve í Portugal, er í døgunum 21. mars til 4. februar, og fleiri av heilt sterku londunum eru við í kappingini. Bólkarnir eru skipaðir eftir styrki, og føroysku kvinnurnar eru í bólki C saman við Portugal, Rumenia og Eysturríki. Álvur Hansen hevur tikið út hendan hópin: Asta Magnussen, Steintóra Joensen og Olga Kristina Hansen úr AB. Ansy Sevdal úr B68/NSÍ. Liljan av Fløtum Petersen úr HB. Sigrid Jacobsen, Malena Josephsen, Rannvá B. Andreasen og Randi S. Wardum úr KÍ. Fríðrún Danielsen, Kirstenbjørg Frederiksberg og Evi Mikkelsen úr Skála. Rósa Magnussen og Heidi Sevdal úr Víkingi. Sólvá Joensen úr danska BK Skjold. Bjarta Ó. Johansen úr danska Team Viborg. Mona Breckmann úr týska Karlsruher SC





Áhugin millum ungar spælarar hevur ongan tíð verið størri, enn hann er í løtuni, verður sagt hjá Badmintonsambandinum

# Badminton veksur í fullari ferð

**Oyggjaleikagullið á Álandi tykist veruliga hava sparkað gongd í badminton-ítróttina. Ongan tíð hevur luttøkan til Grand Prix kappingina verið størri, enn hon hevur verið í vetur**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Leygardagin spældu yngru spælararnir endaumfar í Grand Prix-kappingini.

Hetta fór fram í Badminton-høllini í Havn, sum kundi nýtast til badminton, hóast frítíðarskúlin á staðnum fyribils er stongdur.

Úr Badmintonsambandinum verður annars sagt, at tað tykist púra greitt, at framúr avrikið hjá badminton-landsliðnum á Álandi verður hevur skumpað undir áhugan fyri ítróttini.

Í ársins útgávu av Grand Prix-kappingini, hava 159 spælarar tikið lut í teimum trimum aldursbólkunum, og hetta er nógv tað hægsta talið, sum hevur verið. Av hesum hevur nærum helmingurin tikið lut í U11.

Næsta kapping hjá ungu spælarunum verður tann 20. januar, tá Badmintonhøllin í Klaksvík er karmur um FM-kappingina.



Nógv varð laft fyri, tá avgerandi dystirnir vóru á skránni

## Badminton Grandprix 2009 - 2010

| | | | Stig |
|---|---|---|---|
| **U-11 Gentur** | | | |
| 1 | Jóna Jensen | ÍF | 1480 |
| 2 | Rana Johannesen | VÍF | 1370 |
| 3 | Ester M. Olsen | ÍF | 1230 |
| 4 | Petra Ingebrichtsen | VÍF | 1205 |
| 5 | Frígerð K. Hansen | ÍF | 1125 |
| 6 | Randi á Bergi | KBF | 1070 |
| 7 | Gunn á Rógvi | VÍF | 1070 |
| 8 | Marianna Andreasen | KBF | 1035 |
| 9 | Femja M.Jacobsen | KBF | 1015 |
| 10 | Lena Poulsen | KBF | 930 |
| **U-11 Dreingir** | | | |
| 1 | Jákup Jacobsen | ÍF | 2000 |
| 2 | Bartal Poulsen | VÍF | 1880 |
| 3 | Jákup N Olsen | ÍF | 1790 |
| 4 | Brandur Jákupsson | HBF | 1750 |
| 5 | Andras Dánjalsson | MBF | 1680 |
| 6 | Regin á Rógvi Joensen | VÍF | 1670 |
| 7 | Fríði T Olsen | HBF | 1590 |
| 8 | Teodor Jacobsen | ÌF | 1560 |
| 9 | Dann Fróðasson | MBF | 1531 |
| 10 | Finnbogi H. Joensen | VÍF | 1450 |
| **U-13 Gentur** | | | |
| 1 | Kristina Eriksen | HBF | 1850 |
| 2 | Sólfríð H. Joensen | VÍF | 1760 |
| 3 | Rebekka Johnsdóttir | VÍF | 1620 |
| 4 | Mathilda Hansen | KBF | 1390 |
| 5 | Angela Petersen | MBF | 1231 |
| 6 | Jonita á Plógv | MBF | 1220 |
| 7 | Miriam Haraldsen | MBF | 1120 |
| 8 | Tanja Poulsen | KBF | 1117 |
| 9 | Arnborg Lervig | ÍF | 1030 |
| 10 | Hjørdis Rasmusardóttir | ÍF | 880 |
| **U-13 Dreingir** | | | |
| 1 | Sámal Joensen | ÍF | 1970 |
| 2 | Magnus Dal Christiansen | HBF | 1910 |
| 3 | Aron Cornette | ÍF | 1800 |
| 4 | Bárður Petersen | ÍF | 1680 |
| 5 | Jóhannes Jóannesson | HBF | 1570 |
| 6 | Magnus H. Eysturoy | HBF | 1550 |
| 7 | Johan Petersen | ÌF | 1520 |
| 8 | Rógvi Ziskason | HBF | 1470 |
| 9 | Teitur V Jakobsen | HBF | 1440 |
| 10 | Magni Weihe | MBF | 1370 |
| **U-15 Gentur** | | | |
| 1 | Helena S. Lamhauge | HBF | 1471 |
| 2 | Svanna Poulsen | VÍF | 1390 |
| 3 | Tina Joensen | KBF | 1325 |
| 4 | Heidi Christoffersen | VÍF | 1320 |
| 5 | Barbara Eysturoy | HBF | 1200 |
| 6 | Helena Kjeld | ÍF | 1160 |
| 7 | Maria Petersen | ÍF | 575 |
| 8 | Ásla Johannesen | KBF | 540 |
| 9 | Marita Atladóttir | VÍF | 290 |
| 10 | Marita Magnadóttir | ÍF | 270 |
| **U-15 Dreingir** | | | |
| 1 | Arnold Kristiansen | ÍF | 1970 |
| 2 | Heðin Poulsen | KBF | 1890 |
| 3 | Pól Magnus Petersen | ÍF | 1830 |
| 4 | Páll Eysturoy | HBF | 1750 |
| 5 | Mikkjal Olsen | KBF | 1730 |
| 6 | Rógvi Jacobsen | KBF | 1631 |
| 7 | Jakob Eriksen | HBF | 1550 |
| 8 | Bjartur á Norði | HBF | 1500 |
| 9 | Martin Justinussen | HBF | 1491 |
| 10 | Klæmint Klakk | KBF | 1410 |